## Kunningarfundur um NORDPULS

Hósdagin skipar Altjóða Skrivstovan fyri kunningarfundi um Nordplus, ið er ein útbúgvingarskipan hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum. Fundurin verður í Læraraskúlahøllini og byrjar kl.13. Hann vendir sær til øll, sum hava áhuga í norðurlendskum samstarvi við atliti at útbúgving og lívslangari læring. Norðurlendska Ráðharraráðið hevur í tíðarskeiðinum 2008-2011 sett í verk eina nýggja Nordplus rammuskrá, ið gevur stuðul til mobilitet, netverksskapan og samstarv á útbúgvingarøkinum. Tað nýggja í hesi skránni er m.a., at tey trý baltalondini Estland, Letland og Litava eru komin uppí norðurlendska samstarvið. Nordplus rammuskráin fevnir um fýra høvuðsskipanir: Nordplus Horisontal, Nordplus Junior, Nordplus Hægri Útbúgving og Nordplus Vaksin. Umframt kunning um skipanirnar verður eisini greitt frá tveimum tvørgangandi Nordplus-skipanunum, ið ikki eru partar av nýggju rammuskránni. Tær eru: Nordplus Mál & Mentan og Russlandsskipanina, sum er skipan, ið er ætlað til at menna samstarv millum Norðurlond og Útnorðurrussland innan alt útbúgvingarøkið. Endamálið við Nordplus skipanunum er, at tær skulu styrkja norðurlendska-baltiska felagsskapin og samleikan við støði í søguligu, mentanarligu og demokratisku felagseyðkennunum hjá londunum.

# Vil hava eina smala sjálvstýrissamgongu



*- Tær bestu samgongurnar, eru tær smalu samgongurnar, sum akkurát hava meirilutan aftanfyri seg, sigur nývaldi fólkafloksmaðurini Havn, Poul Michelsen*

**Poul Michelsen vil hava eina samgongu við so lítlum meiriluta sum gjørligt og hann vil hava, at sjálvstýrismálið verður sjónligt í nýggja samgonguskjalinum**

SAMGONGA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Skulu vit vera við í eini nýggjari samgongum skal sjálvstýrismálið týðiliga fram í samgonguskjalinum.

Tað staðfestir nývaldi tingmaðurin hjá Fólkaflokkinum í Havn, Poul Michelsen.

Hann hevur ongantíð dult fyri, at hann hoyrir til tann meiri loysingarsinnaða vongin í Fólkaflokkinum og hann sigur, at skal flokkurin við í eina samgongu nú eftir valið, er tað ongin ivi um, at sjálvstýrismálið skal vera sjónligt í tí nýggja samgonguskjalinum.

Hinvegin vil hann ikki siga nakað um, hvørja samgongu, hann kundi hugsa sær, ella

- Tað er ein spurningur, sum formaður okkara, Jørgen Niclasen, arbeiðir við í hesum døgum og tað lati eg yvir til hann.

Í fyrstu syftu verður kannað eftir, um ABC samgonguni er lív lagað og um hon kann halda fram. Men er tað ikki ein møguleiki, verður so kannað eftir, hvørjir aðrir møguleikar eru.

- Floksleiðslan hevur so fingið at frá okkum í tingmanningini, hvat liggur okkum á hjartað og so verður arbeitt eftir tí.

### Ein smøl samgonga

Men umframt at hann vil hava sjálvstýrismálið sjónligari, vil Poul Michelsen eisini hava eina samgongu, sum er so smøl, sum gjørligt.

- Mær dámar best tær smalu samgongurnar, sum akkurát hevur meiriluta.

Sostatt vil hann helst hava eina samgongu, sum bara hevur 17 tinglimir.

- Tað livi eg fínt við, tí tað krevur moral og disiplin av øllum samgongulimunum og eg havi altíð hildið, at tær eru tær sterkastu samgongurnar.

Sostatt er hann ikki samdur við teimum, sum halda, at stóran samgongur við 20 ella 21 tinglimum, eru tær sterkastu.

- Ein stór samgonga kann tykjast sterk ta fyrstu tíðina, men tá ið líður út á valskeiðið, er tað altíð onkur, sum spælir fríspæl, sum vit so mangan sóu tað í samgonguni í valskeiðnum, sum nú er farið og tað skapar eina øgiliga órógv, sigur Poul Michelsen.

Men hinvegin er tað eisini ein politisk kabal, sum ganga upp og gongur hon best upp í eini størri samgongu, hevur Poul Michelsen heldur onki ímóti tí.

Tað kann eisini leggjast afturat, at Poul Michelsen er ikki einsamallur í Fólkaflokkinum, sum vil hava sjálvstýrismálið aftur á dagsskrá, tí sum vit skriva í aðrari grein her í blaðnum, vil ein annar nývaldur tinglimur hjá Fólkaflokkinum, Annika Olsen, eisini hava sjálvstýrið á breddan.


Húsamekling
www.husamekling.fo
Vit selja húsini



Undir Gráasteini, blok. 1A 5. hædd
Stødd á húsum: 105 m² + goymslurúm 13 m²
Stødd á grundøki: Felagsøki
Byggiár: 2007
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist



430 Oyri – nýggj tvíhús
Stødd á húsum: 68 m² x 2 + loft
Stødd á grundøki: Uml. 300 m²
Byggiár: 2007
Kostnaður: Kr. 1.280.000,-



Bergsvegur 6, Tórshavn
Stødd á húsum: Uml. 59 m² x 2 + loft
Stødd á grundøki: 570 m²
Byggiár: 1933
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist



Suðurstíggjur 1, Argir
Stødd á húsum: 119 m² + kjallara, loft og hjall
Stødd á grundøki: 581 m²
Byggiár: 1979
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist



Oyrabakki – tvíhús í gerð
Stødd á húsum: 72 m² x 2
Stødd á grundøki: 300 m²
Byggiár: 2008
Kostnaður: Kr. 1.400.000,-



Fútalág 30, Tórshavn
Stødd á húsum: Uml. 90 m² x 3 + hjall
Stødd á grundøki: 384 m²
Byggiár: 1973
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

www.husamekling.fo · husamekling@husamekling.fo · Vaglið · Tórshavn · Tel. 323000 · Fax. 323001


# Ótrúliga stuttligt at sleppa aftur á ting

**Hann er fýra ár eldri, men hann hevur eisini fýra ára royndir afturat at tak við sær inn á ting**

LØGTINGSVAL 08
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Heini O. Heinesen*

Heini O. Heinesen var fastur táttur í politisku myndini, men á seinasta vali tapti hann fyri Karsteni Hansen

Men nú Karsten var farin upp í Miðflokkin, var slóðin ruddað fyri, at Heini O. Heinesen kundi gera vart við seg aftur.

Og tí møguleikanum tók hann av.

Kunoyingurin var valdur aftur á ting leygardagin og tað er ein avbjóðing, hann gleðir seg til.

- Tað verður ótrúliga stuttligt at sleppa aftur upp í tað politiska arbeiði, sigur hann.

- Hann sigur, at enn sum áður verður fiskivinnan hansara høvuðsmál og tað førir hann seg enn betri brynjaðan til nú, enn tá ið hann fór úr Løgtingingum.

- Eg eri fýra ár eldri, men eg havi eisini fýra ára royndir afturat við mær

Tá ið hann stillaði upp, visti hann ikki um hann fekk nóg stóra undirtøku, serliga nú alt landið er eitt valdømi, men hann hevði kortini varhugan av, at hann hevði eina ávísa undirtøku í Norðoyggjum og tí kemur úrslitið kortini ikki heilt óvart á hann.